## Botnliðið harðast revsað

Tórður Mortensen úr TB og Magni Jarnskor úr GÍ vóru mest sektaðu spælararnir í fótbóltskappingini 2002. Merkisvert var tað, at Tórður Mortensen í sjey dystum fekk tvey reyð kort og tvey gul kort. Magni Jarnskor sá reytt eina ferði og fekk seks gul kort í fimtan dystum.

Í 2001 var Fríðin Ziskason mest sektaði spælarin, og dómararnir vóru aftur hesa ferð ofta í holtur við Fríðin, sum hevði skift bláu KÍ troyggjuna út við reyða B68 búnan. Fríðin varð tvær ferðir rikin av vøllinum – báðu ferðirnar í fyrra hálvleiki.

Feløgini hjá teimum trimum nevndu – TB, GÍ og B68 – fingu flest sektarstig í 2002. Einasta liðið í 1. deild, sum slapp undan reyðum kortum í landskappingini, var KÍ, og klaksvíkingar skikkaðu sær eisini best, tí teir fingu fægst sektarstig av øllum.

1. deildarliðini fingu hesi sektarstig: TB (51), B68 (50), GÍ (47), NSÍ (45), B36 (41), EB/Streymur (35), VB (35), Skála (34), HB (30) og KÍ (28).

(Kelda: Fótbóltur '02)

## Nógvir fingu sekkin

Fimm av teimum tíggju 1. deildarfeløgunum søgdu í fjør venjaranum hjá sær úr starvi. Felags fyri flestu uppsøgnirnar var, at útlendingar fingu sekkin, meðan føroyingar vórðu settir í størvini aftaná.

Zoran Mancic hjá TB var fyrsti venjarin, sum reyk, og í hansara stað kom Lynge Nielsen. Men hann legði eisini kongin móti endanum av kappingini, og so tóku brøðurnir Jón og Óli Johannesen yvir. Niðurflytingin kundi tó ikki fyribyrgjast.

Í juni mánaði sendi VB sín venjara, Dragan Kovacevic úr Jugoslavia, heim, og í hansara stað kom Marek Wierczbicki, sum hóast ættaður úr Póllandi, er roknaður føroyingar, tá ið talan er um fótbólt.

HB segði eftir summarsteðgin Ion Geolgau upp, eftir at hann hevði verið venjari síðani 1998. Kári Nielsen og Jóannes Jakobsen tóku yvir og gjørdu seinasta partin av arbeiðnum, so HB kundi gerast meistari.

Skála segði eftir 14. umfar Mathias Davidsen úr starvi, og avloysarin varð Hans Jákup Andreasen. Hjálparvenjari hjá honum gjørdist Justinus Justinussen.

Eisini B68 skifti venjara móti endanum av kappingini. Frank Skytte varð sagdur upp, og Kjartan Nesá og Ingolf Petersen tóku sær av seinastu dystunum.

Av teimum venjarunum, sum stóðu við róðrið í 1. deildarfeløgunum, tá ið kappingin byrjaði í fjør, er tað bara Jógvan Martin Olsen, sum venur sama felag í ár. Hann gjørdist eisini Ársins venjari í fjør, tá ið NSÍ hevði sítt besta kappingarár nakrantíð.

(Kelda: Fótbóltur '02)



*Rúni Elttør í Europa Cup dysti á Svangaskarði. Í ár skulu HB, NSÍ, KÍ og GÍ spæla europeiskar dystir.*

Mynd: Álvur Haraldsen

# Fýra feløg fara út í Europa

**Fýra tey fremstu feløgini í kappingini í fjør skulu í summar royna seg í altjóða fótbólti. Úrslitini í europeisku kappingunum eru stundum góð, men føroysk lið klára ikki at spæla seg víðari**

EYÐUN KLAKSTEIN

HB, NSÍ, KÍ og GÍ skulu í ár umboða føroyskan fótbólt í kappingunum hjá UEFA.

Hetta er 12 árið á rað, at føroysk feløg spæla við í europeiskum kappingum, og úrslitini hava verið misjøvn.

Føroysku mansliðini hava spælt 62 europeiskar dystir, men bara tríggjar ferðir er tað komið fyri, at okkara umboð hava vunnið.

KÍ vann í 1995 3-2 á Maccabi Haifa úr Ísrael, og HB vann í 1998 2-0 ímóti Vaasa úr Finnlandi. Harafturat vann HB ein dyst á skriviborðinum, tá ið RAF Latvia úr Letlandi ikki fekk lent í Vágum í 1993.

### Onkur glotti

Í fjør gekk tað hampuliga væl í onkrum dystum. KÍ fekk ein javnleik á heimavølli og tapti bert við einum máli á útivølli, tá ið teir dystaðust við UTE úr Ungarn. B36 tapti báðar sínar dystir ímóti Torpedo Kutaisi, men sera tepurt á heimavølli. GÍ og B68 taptu stórt í sínum dystum, og serliga 8 máls tapið hjá GÍ á heimavølli ímóti Hadjuk Split tók dygt.

Eisini kvinnurnar hjá KÍ vóru við í meistarakappingini hjá UEFA, og tær spældu tríggjar dystir. Tveir av dystunum vóru taptir við fýra og sjey málum, meðan tað eydnaðist KÍ at vinna ein av dystunum við tveimum málum.

### Koma ikki víðari

Men hóast úrslitini hjá føroysku feløgunum av og á hava verið góð, so klára feløgini ikki at spæla seg víðari frá teimum fyrsta innleiðandi umførinum, og tað er sjáldan, at føroysk feløg yvirhøvur eru nær við at koma víðari í kappingunum, tey eru við í.

Bara einaferð er tað komið fyri, at eitt felag er komið víðari.Tað var, tá ið HB í 1993 vann ein dyst á skriviborðinum og varð sent víðari í UEFA Cup, har teir síðani taptu.

Føroysku feløgini eru styrkismett langt niðri á listanum, og tað ger, at tey so at siga altíð spæla ímóti liðum, sum eru væl sterkari. Hetta sæst eisini aftur á vøllinum, har føroysk feløg mangla tað seinasta, sum skal til fyri at vinna.

### Pengar í kassan

Umframt stóru ítróttarligu avbjóðingina, sum tað er fyri spælarar og feløg at verða við í Europa Cup, so snýr luttøkan seg eisini um pengar.

Serliga felagið, sum er við í Champions League, fær nógv burtur úr luttøkuni. Fyrsti innleiðandi dysturin kastar stívliga 1,1 millión krónur av sær, og tað kemur væl við í einum og hvørjum føroyskum pengakassa.

Feløgini, sum eru við í UEFA Cup og Intertoto Cup, fáa als ikki somu upphædd. UEFA Cup gevur umleið 400.000 krónur, og Intertoto 250.000. Tá ið talan ofta er um kostnaðarmiklar ferðir, so liggur millum lítið og einki eftir í feløgunum, tá ið dystirnir eru spældir.

1. deildarfeløgini, sum ikki sleppa við í europeisku kappingarnar, fáa eisini eina samsýning frá UEFA. Hendan samsýning hevur verið 190.000 krónur, og tað munar væl, tí hesi feløg hava ongar útreiðslur av altjóða dystum.

### Europeiskt summar

Europeisku kappingarnar byrja í summar. Intertoto kappingin fer í gongd áðrenn summarsteðgin, og tá skal GÍ so royna seg fyri 11. ferð í europeiskum fótbólti.

Seinni í summar skal HB verða við í fyrsta innleiðandi umfarinum til Champions League, og NSÍ og KÍ vera við í UEFA Cup.

KÍ ætlar sær aftur í ár at vera við í kvinnukappingini hjá UEFA, og hendan kappingin plagar at byrja í september ella oktober. Her er talan um bólkaspæl, og tí sleppa KÍ-kvinnurnar at spæla í minsta lagi tríggjar dystir.




